# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um eggjastokkakrabbamein

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um eggjastokkakrabba

Um kvinna hevur hesi sjúkueyðkenni (ofta 3-5 sjúkueyðkenni gjøgnum 4-6 mánaðir)

- Búkurin vaksin/ífylla (útspílað abdomen)
- Tyngdarkenslu í undirlívinum
- Pínu í búkinum/undirlívinum
- Vætu í búkholuni (ascites)
- Versnaðan matarhug/kvalmu
- Títtari vatnlát
- Forstoppilsi
- Møði
- Andaneyð
- Blóðtøpp í beini

Skal lækni útinna/kanna:

- Undirlívskanning
- Palpatión av abdomen
- CA125 (tumormarkørur, ið er hækkaður hjá 70-75% av kvinnum við krabbamein í eggjastokkum)
  Spyrja um ættarbregði til krabba

Um onnur orsøk ikki kann staðfestast til sjúkueyðkenni, skal ávísast til krabbameinsútgreining.

## Handfaring av recidiv

- Í uppfylgingartíðarskeiðnum: Ávísing sendast til gynekologiskt ambulatorium
- Eftir uppfylgingartíðarskeiðið: Nýggj ávísing sendast til krabbameinsútgreining

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um eggjastokkakrabba" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026